

# Meiri vindorka

Tað var ein hátíðarløta, tá Fríðrikur krúnprinsur og Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, settu 91 nýggjar vindmyllur til tað danska elkervið í dag. Tær 91 vindmyllurnar standa 15 fjórðingar úr vesturjútsku strondini og mynda verkætlanina Horns Rev 2, sum er heimsins størsta havvindmyllulund. Connie Hedegaard, veðurlagsráðharri, sigur við DR, at tað er sera umráðandi hjá dønum at útbyggja tær varandi orkukeldurnar, nú oljan og gassið í Norðsjónum fara at minka. Fleiri verkætlanir eru í gongd, og tey næstu árini verða minst tvær stórar havvindmyllulundir afturat tilnar í nýtslu.

# nuøkinum

byrjaði í Keypmannahavn í gjár og endar klokkan 17 í dag.

Seinnapartin í gjár var Jørgin Niclasen á fundi við starvsbrøður sínar úr hinum báðum londunum í útnorði, Íslandi og Grønlandi. Tað eru hesi bæði londini, sum saman við Føroyum og undir felagsskapinum NATA (North Atlantic Tourism Association) standa aftan fyri hetta ferðavinnutiltak.

Ráðharrin úr Íslandi er Katrín Júlíusdóttir og ráðharrin úr Grønlandi er Ove Karl Berthelsen.

Hetta var ein óformligur fundur við ongari skrá, sum vit fara at venda aftur til í aðrari grein.

### Nú er at handla

Jørgin Niclasen sigur, at hann sum ferðavinnuráðharri heldur, at nú er nóg mikið tosað í Føroyum um at fáa ferðafólk hendanvegin.

- Nú hava vit tosað nóg mikið. Nú eiga vit at handla, leggur hann dent á.

Landsstýrismaðurin heldur, at Føroyar hava nógv at bjóða útlendskum ferðafólki, og Føroyar hava eisini nógv at bjóða hvørjum øðrum, sum vilja ferðast í egnum landi, bæði við summarhúsum, gongutúrum, útferðum og í aðrar mátar.

- Tilboðini í Føroyum eru mong, og vit síggja á hvørjum ári nýggj og spennandi tilboð av ymiskum slagi. Vit eiga ikki longur at tosa um, hvørt okkum vantar eitt wc í Svínoy – ella ein handil í Gásadali. So hvørt, sum ferðafólkini eru komin higar og framhaldandi – og vónandi í enn størri tali – fara at koma higar, koma fasilitetirnir og tilboðini eisini.

Skemtiliga tekur hann til, at enn "eksisterar" fría fyritakssemi, sum tillagar seg marknaðin og eftirspurningin.

- Søgan sigur okkum, at so hvørt, sum tørvur og eftirspurningur veksa, koma eisini neyðugu fasilitetirnir. Hetta er ein "mekanisma", sum er borin í okkum, leggur hann aftrat.

### 9 miljónir krónur

Ólavsøkupakkin hjá hesi samgongu hevur verið nógv umrøddur og hevur fingið mong skotini.

- Men ein partur av hesum pakka er, at vit skjóta upp at játta 9 miljónir krónur um árið í trý ár til marknaðarføring av Føroyum sum ferðamannalandi.

Jørgin Niclasen sigur, at hesin peningur í fyrsta lagi skal brúkast til at fáa útlendsk ferðafólk til Føroya, eins og ein partur skal brúkast til at fáa føroyingar at ferðast meira í egnum landi.

- Enn liggur ikki í føstum rammum, hvussu hesin peningur ítøkiliga skal brúkast, men hetta fer ferðavinnudeildin í uttanríkisráðnum saman við føroysku ferðavinnuni at finna út av.

Sum landsstýrismaðurin nevndi fyrr í samrøðuni, er ætlanin at velja út nøkur lond, sum farast skal eftir.

- Skulu vit byrja heilt av nýggjum og lýsa á stóru pallunum kring um heimin og í londum, har fólk framman undan slett ikki vita, hvar Føroyar eru, røkkur ein slík peningaupphædd ongan veg. Men verður peningurin hinvegin nýttur í londum, sum vita um Føroyar, kann væl fáast burtur úr hesum miljónunum, sigur hann.

### Fleirifaldast

Jørgin Niclasen vísir á, at í øðrum londum, har miðvíst verður arbeitt við at fáa ferðafólk til londini, vísa kanningar, at fyri hvørja krónu, sum tað almenna leggur út til slík endamál, fáast 15 krónur innaftur, um rætt verður atborið.

- Ferðavinnan í Føroyum sigur, at tað eru ferðafólk henni tørvar, og hetta hava vit í landsstýrinum sett okkum fyri at gera nakað munagott við næstu árini, sigur landsstýrismaðurin.



*Ferðavinnuráðharrarnir úr Føroyum, Íslandi og Grønlandi, Jørgin Niclasen, Katrín Júlíusdóttir og Ove Karl Berthelsen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Útnorður heldur fast um samstarv

**Meðan fleiri lond hava merkt sær, at ferðafólkatalið hevur verið fallandi, hevur Ísland higartil í ár havt ein vøkstur upp á 10-12%. Miljónin, sum Ísland letur í ferðavinnusamstarvinum í útnorði, svaraði til 10 miljónir íslendskar krónur fyri ikki langari tíð síðan. Nú íslendska krónuvirðið er so lágt, svarar henda eina miljónin til einar 25 íslendskar miljónir. Men Ísland ætlar sær ikki úr hesum samstarvi**

TRAVEL MART
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Teir tríggir ráðharrarnir í ferðavinnumálum í Føroyum, Íslandi og Grønlandi høvdu ein sínámillum fund í gjár, har tey eitt nú tosaðu um framtíðina hjá NATA (North Atlantic Tourism Association), ið stendur aftan fyri Vestnorden Travel Mart.

Hetta var ein lutfalsliga stuttur fundur, ið varð hildin í hølunum, sum tíðindafólk hava á Scandic Copenhagen, har ferðavinnustevnan er.

Eftir fundin hittu vit Jørgin Niclasen og starvsbrøður hansara í ávikavist Íslandi og Grønlandi, Katrín Júlíusdóttir og Ove Karl Berthelsen.

Sum skilst, var hetta ein óformellur fundur, men semja er millum londini um, at ferðavinnusamstarvið millum Føroyar, Ísland og Grønland skal halda fram, men samstundis skal samstarvið skipast betri, eins og arbeiðast skal fyri at geva NATA betri umstøður.

### Eftirmeting

NATA hevur nú trý ár á baki, og partarnir eru eisini samdir um, at virksemið hjá felagsskapinum eigur at eftirmetast, so meira kann fáast fyri tann pening, sum londini hvør í sínum lagi lata felagsskapinum.

Tað er soleiðis, at Føroyar og Grønland lata hvør sínar 500.000 krónur um árið, meðan Ísland letur eina miljón krónur.

Soleiðis hevur NATA umleið tvær miljónir krónur at arbeiða við, sum eitt nú verða játtaðar eftir umsóknum til átøk, sum í minsta lagi tvey av londunum eru partur av.

Ein partur av hesum peningi hevur verið játtaður skúlaungdómi, sum vitjar ungdóm í einum øðrum landi av hesum trimum, og eisini er stuðul játtaður eitt nú hornorkestrum, tónleikabólkum og sangbólkum.

Stuðul er eisini veittur starvsnæmingum, sum hava valt at fara í starvsvenjing í einum av hesum londum.

Nú Vestnorden Travel Mart er í Keypmannahavn, hevur felagsskapurin eisini havt fund. Trý umboð úr hvørjum av hesum trimum londunum mynda NATA, og formaður er føroyingurin, Per Hansen.

Á fundinum í gjár veitti NATA stuðul til ymiskar verkætlanir, sum í høvuðsheitum snúgva seg um menning av ferðavinnusamstarvinum í útnorði.

Stuðul kann eitt nú veitast marknaðarføring, sum hevur við ferðavinnuátøk í hesum trimum londunum at gera.

### Dýr miljón

Vit kunnu leggja aftrat, at miljónin, sum Ísland letur til NATA, svaraði fyri ikki so langari tíð síðan til 10 íslendskar miljónir. Í dag, nú íslendska krónan hevur mist so nógv virði, svarar henda eina miljónin til umleið 25 íslendskar miljónir.

Men Ísland ætlar sambært Katríni Júlíusdóttir ikki at bakka út úr hesum samstarvi, og nú landið hevur verið í stórari kreppu og lágum krónuvirði, er hetta kortini komið íslendsku ferðavinnuni til góðar.

Meðan fleiri lond hava merkt sær, at ferðafólkatalið hevur verið fallandi, hevur Ísland higartil í ár havt ein vøkstur upp á 10-12%.